# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

21. juli fingu Óleva Johannesen og Kim Thomasen, Froðba, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4000 gr.

23. juli fingu Sóley í Homrum og Rani S. Rasmussen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3050 gr.

24. juli fingu Turid Gaardlykke og Jóhannes Davidsen, Miðvági, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3500 gr.

25. juli fingu Bjørg og Terji Nielsen, Oyndarfirði, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4000 gr.

25. juli fingu Maria og Djóni á Boðanesi, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3600 gr.

25. juli fingu Noomi á Hvítanesi og Terji Thomsen, Strondum, tvíburðar, gentu og drong. Dótturin var 45 cm long og vigaði 1790 gr, sonurin var 44 cm langur og vigaði 1810 gr.

26. juli fingu Svanhilda Sirdal og Olgar Jacobsen, Klaksvík, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2900 gr.

26. juli fingu Heidi og Jens Højen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3800 gr.

27. juli fingu Óluvá og Jón Rubeksen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3600 gr.

27. juli fingu Súsanna og Jákup Petur Eliassen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4200 gr.

28. juli fingu Bryndis G. Petursson og Jóhan Simonsen, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3400 gr.

29. juli fingu Rúna Seyer Hansen og Hjalti Eliasen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3700 gr.

29. juli fingu Frida Sigmundsdóttir og Eddie Joensen, Kollafirði, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4290 gr.

29. juli fingu Sonja og Hans Olsen, Rituvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3700 gr.

30. juli fingu Tanja Huneck og Símun Pauli Jacobsen, Glyvrum, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3100 gr.

31. juli fingu Jacqueline og Gunnar Skúvadal, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 3900 gr.

4. juli fingu Hildur Elisabeth og Thea Malena ein lítlabeiggja. Hann var 51 cm langur og vigaði 3350 gr. Foreldur teirra eita Anna Svandis og Pauli Danielsen og búgva í Tørring.

## Andlát

24. juli
Marin Kristina Klemmentsen, Húsavík, 58 ár
26. juli
Esther Olsen, Tvøroyri, 77 ár
27. juli
Hjalgrím Poulsen, Syðrugøta, 79 ár
28. juli
Bertha Suðurberg fødd Davidsen, Hvalba, ættað úr Kvívík, 94 ár
29. juli
Petur Pauli Petersen, Sandi, vanliga nevndur Petur hjá Árabo, 91 ár
30. juli
Jóhannes Hansen, Hvalvík, 69 ár

## Marita og Mortan Joensen gullbrúdleyp



Leygardagin 2. august kunnu hjúnini Marita og Mortan Joensen á Argjum halda gullbrúdleyp.

Marita er fødd 24. august 1931 í Miðvági, dóttir Alvildu, f. Jacobsen, ættað uppi við Garð úr Leirvík, og Dávur Hansen, úr Kirkjarstovuni í Miðvági. Hon kom sum ung til Argjar og arbeiddi í handlinum hjá Richardi Mortensen. Seinni arbeiddi hon sum reingerðingsfólk á skrivstovunum hjá P/F Poul Hansen á Vestaru Bryggju. Annars hevur Marita fyri tað mesta verið heimaarbeiðandi. Marita hevur stóran áhuga fyri hondarbeiði, og hevur gingið nógvar vetrar til hondarbeiði á kvøldskúla. Onkran vetur hevur hon kortini valt at læra seg meiri mál í kvøldskúlanum. Hon er eisini virkin innan sjómanskvinnuringin.

Mortan er føddur á Argjum 26. juli 1926, sonur Johonnu Margrethu, f. Mortensen, vanliga nevnd Hanna hjá Linu, av Argjum, og Jacob Paula Joensen, vanliga nevndur Norðskála Palli, ættaður av Norðskála. Mortan arbeiddi eina tíð í súkklusmiðjuni hjá André Andrésen, áðrenn hann fór at læra til maskinsmið hjá Wenzel Petersen í Havn. Tá hann varð útlærdur har, fór hann til Klaksvíkar á maskinskúla. Tá hann hevði tikið maskinmeistaraprógv, fór hann til Danmarkar, har hann tók víðkað maskinmeistaraprógv. Hann sigldi sum maskinmeistari við ferðamannaskipinum Smirli og við verjuskipinum Ternuni hjá donsku sjóverjuni. Hann sigldi við Ternuni m.a. undir Klaksvíksstríðnum í 50-unum, tá teir m.a. vóru við í vaktarhaldinum í Klaksvík. Seinni var hann maskinmeistari á trolaranum Jóannesi Patursson. Síðst í 50-unum fekk hann starv sum maskinmaður á fiskavirkinum Bacalao í Havn. Í 1969 varð hann settur í starv sum bilsýnsmaður hjá Tryggingarsambandinum Føroyar. Hetta starv røkti hann, til hann legði frá sær fyri aldur.

Mortan hevur altíð havt stóran áhuga fyri mekanikki. Hann hevur verið servicemaður hjá Thomas Dam, har hann hevur umvælt súkklur, knallertir og motorsúkklur. Hann sat 12 ár í bygdaráðnum á Argjum. Seinnu árini hevur Mortan fingist nógv við seyð, hann hevur um 20 seyðir.

Marita og Mortan eiga synirnar Hans Paula og Dan, fimm ommu- og abbabørn og eina langommu- og abbadóttir.

Gullbrúdleypsdagurin verður hildin í heiminum á Rosságøtu 8 á Argjum í dag frá kl. 10 til 15, har øll eru hjartaliga vælkomin.

## Hans Eli Dahl stjóri á Sernámsdeplinum



Frá 1. august 2003 er Hans Eli Dahl í Havn settur sum stjóri á Sernámsdeplinum. Hans Eli er 59 ára gamal og havnarmaður. Hann er sonur Edith, f. Jacobsen, úr Vestmanna, og Paula Dahl úr Havn. Hann er giftur við Birnu, f. Jensen, úr Froðba. Hans Eli tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1967 og var lærari í Sørvági frá 1967-71, og í Tórshavnar Kommunuskúla skúlaárið 1971-72.

Umframt sína læraraútbúgving hevur hann útbúgving sum tali- og hoyrilærari. Hann hevur drúgvar royndir í undirvísing og ráðgeving. Í 1984 varð hann settur sum lesiráðgevi á Landsskúlafyrisitingini, og eftir at ráðgevingin í 1991 flutti á Skúlan á Trøðni, varð starvið umskipað til pedagogiskan ráðgeva. Síðan 1. februar 2001 hevur Hans Eli verið fyribilsstjóri á Sernámsdeplinum.

Sernámsdepilin er stovnur undir Mentamálaráðnum við egnari rakstrarjáttan á fíggjarlógini. Til Sernámsdepilin hoyrir eisini Skúladeildin í Sernámsdeplinum. Í Sernámsdeplinum og Skúladeildini starvast 57 starvsfólk.

Nýggi stjórin skal vera við í tilrættaleggingini og nýskipanini av øllum tí sernámsfrøðiliga økinum. Hann skal leiða og stýra øllum tí fyrisitingarliga og námsliga virkseminum á Sernámsdeplinum, hava ábyrgdina av fakligari menning og eftirútbúgving av starvsfólkum í sernámsfrøðiliga virkseminum í undirvísingarverkinum. Saman við Mentamálaráðnum skal stjórin vera við til at gera reglur um virksemið á sernámsfrøðiliga økinum og skapa virðing fyri stovninum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Finnur Hansen 75 ár



Ólavsøkudag, 29. juli, fylti Finnur Hansen í Hoyvík 75 ár. Finnur er føddur í Hvalvík, sonur Fridu og Martin Jacobsen, úr Hvalvík. Sum fýra ára gamal kom hann til Havnar og vaks upp hjá mostrini, Juliu, og Frits Hansen, (Frits í Pætursastovu), í Tróndargøtu í Havn. Sum ungur hevði hann egna bilstøð í Tróndargøtu í Havn. Hann íðkaði ítrótt, var høgri bakkur í HB og róði við Havnarbátinum. Hann er útbúgvin timburmaður, og hevur hann m.a. arbeitt hjá byggifelagnum Danberg & Sørensen og koyrdi eitt stutt tíðarskeið tangabil hjá oljufelagnum Shell.

Frá 1981 til 1989 var Finnur fyristøðumaður í Filadelfiasamkomuni í Havn. Hann er eisini best kendur fyri sítt virksemi innan hvítusunnurørsluna, har hann bæði talar og syngur. Eisini hevur hann givið nakrar plátur út, har hann bæði syngur sjálvur og saman við børnunum. Finnur er giftur við Juttu, f. Danielsen, dóttir Margrethu og Sofus í Horni (Danielsen), í Havn. Jutta og Finnur hava búð í Havn, men fyri nøkrum árum síðan fluttu tey niðan í Andrasargøtu í Hoyvík. Børnini hjá teimum eru: Miriam, Sofus, Rutt, Myrna og Lydia.

## Eimskip nýggjan stjóra

1. august 2003 tók Brynjar Viggoson við sum stjóri hjá íslendska flutningsfelagnum Eimskip. Brynjar Viggoson skal lyfta arvin eftir Lindu Bjørk Gunnlaugsdóttir, sum hevur verið stjóri í Eimskip í trý ár. Hon fer nú til Íslands, har hon skal leiða eina deild hjá Eimskip Transport.

Brynjar Viggoson hevur arbeitt hjá Icelandic Freezing Plants og hjá Eimskip í Íslandi, sum sølumaður. Seinasta árið hevur hann verið í Hollandi, har hann hevur tikið prógv sum MBA á Haag University.

**md**




*Linda Bjørk Gunnlaugsdóttir, fráfarandi stjórin, heilsar nýggja stjóranum, Brynjar Viggosson, vælkomnum*




*Leiðslan í Eimskip í Føroyum, f.v. Eystein Eyðunsson Elttør, operation leiðari, Bergur Sørensen, pakkhúsleiðari, Ólavur Midjord, CFS leiðari, Linda Bjørk Gunnlaugsdóttir, fráfarandi stjóri, Brynjar Viggosson, nýggjur stjóri, Thomas Dam, fíggjarleiðari, Joel undir Leitinum, sølu- og marknaðarleiðari. Finn Jespersen, CFS leiðari vantar á myndini.*

## Elin Maria Jørgensen 85 ár



Mánadagin 4. august verður Elin Maria Jørgensen í Miðvági 85 ár. Elin Maria er fødd í Brekkunum í Hósvík. Tey vóru 10 systkin. Tveir brøður elstir og so 8 systrar. 6 systrar eru enn á lívi.

1. mai 1943 giftist hon Jóan Paula Jørgensen, úr Skúlanum í Miðvági. Tey fingu 34 góð ár saman. Jóan Pauli doyði í 1977 bert 61 ára gamal. Tey fingu 6 børn, tey eru: Hans, Jóhannes, Anna, Elinborg, Dánial Jákup og Malan. Øll børnini búgva í Vágum.

Hóast tað at hoyrnin og sjónin eru farin at bila, klárar hon seg sjálv heima. Altíð er hon klár at fjálga um familjuna, børn, ommubørn, langommubørn og systrar.

Føðingardagurin verður hildin hjá Dánial Jákup og Hervør í Miðvági.

Vit ynskja henni hjartaliga tillukku við 85 ára degnum og blíðan byr framyvir.

**Børnini við familju**

## Dagurin

**2. august. Hannibal.** Teir vita einki halgimenni við hesum navni. Dagurin hevur havt nógv onnur nøvn, men frá árinum 1700 er Hannibal komin upp í halgimannatalið. Navnið er fønikiskt og merkir náðigáva Baals. Best kendi Hannibal í søguni var tann tiltikni herhøvdingin úr Kartago.

Jóannes Patursson doyði hendan dagin í 1946.

**3. august. Nikodemus.** Dagurin verður hildin til minnis um farisearan, sum kom til Jesus á náttartíð (Jóhs. 3, 1-21). Halgisøgur siga, at eftir deyða Jesu varð Nikodemus kristnaður og doyptur av ápostlunum Pæturi og Jóhannesi. Grikst navn, ið merkir *sigur yvir fólkinum.* Dagurin verður eisini róptur *ólavsøka síðara,* til minnis um, at bein Ólavs vórðu flutt í kirkjuna og løgd í skrín. 3. august í 1030 varð hann lýstur at vera *heilagur maður.*

**4. august. Dominicus,** deyður í 1221. Hann var úr Spaniu, og er fram um alt kendur sum maðurin, ið stovnaði eina munkaskipan, ið fekk navn hansara og skjótt kom víða um lond. Navnið *dominicanes* kann eisini verða týtt *Harrans hundar,* sum fólk róptu teir.

